# Munurin minkar í Íslandi

Ein nýggj meiningakanning vísir, at munurin minkar millum tríggjar teir størstu flokkarnar í Íslandi nú beint undan altingsvalinum. Kanningin vísir, at Samfylkingin missir veljarar, meðan tað legst til hjá Sjálfstæðisflokkinum. Eftir kanningini fær Samfylkingin 28,4 prosent av atkvøðunum ímóti 31,7 í teirri næstseinastu kanningini. Sjálfstæðisflokkurin fær sambært nýggju kanningini 23,7 prosent, og tað er heldur meiri enn í teirri næstseinastu kanningini, sum gav flokkinum 22,5 prosent. Vinstri Grøn standa í stað við ávikavist 27,7 og 27,5 prosentum av atkvøðunum.




# Pentagon húsarannsókn hjá Siemens

Ja, tað ljóðar kanska sum skemt, men tað er satt, at kanningarmenn hjá amerikanska verjumálaráðnum Pentagon hava rannsakað skrivstovurnar hjá amerikonsku deildini av týsku stórfyritøkuni Siemens. Ein talsmaður fyri Pentagon váttar fyri fjølmiðlunum, at høvuðsskrivstovurnar hjá Siemens í USA eru rannsakaðar, men hann vildi ikki siga, hvat endamálið við rannsóknini var. Siemsns hevur eitt dótturfelag í USA, sum eitur Siemens Medical Solutions, og tað var høvuðsskrivstova felagsins í Philadelphia, sum menn frá Pentagon rannsakaðu.



*Heðin D. Poulsen formaður í Ættleiðingarfelagnum*

# Ættleiðingarfelagið stuðlar støkum í ættleiðing

**- Vit halda ikki, at tað er rætt at forða støkum at ættleiða, bara fyri at forða samkyndum í ættleiðing. Tað er skeivt grundarlag, sigur Heðin D. Poulsen formaður í Ættleiðingarfelagnum**

ÆTTLEIÐING

*Barbara Holm*
*barbara@sosialurin.fo*

Í Føroyum eru tað ikki bert hjún, ið kunnu ættleiða børn. Lógin umfatar eisini støk, og av tí at vit í Føroyum ikki loyva skrásettum parlag, so er tað eisini gjørligt hjá eitt nú samkyndum at ættleiða.

Hetta er Heðin D. Poulsen, formaður í Ættleiðingarfelagnum, fegin um.

- Vit stuðla ættleiðing í Føroyum 100 prosent og skilja ikki, hví summar røddir vilja broyta lógina, soleiðis at støk ikki kunnu ættleiða, sigur Heðin D. Poulsen.

### Skulu lúka somu krøv

Hóast møguleiki er hjá støkum eins væl og hjúnum at ættleiða, so eru krøvini hørð, og nógv skal lúkast, áðrenn barnið kann gerast partur av familjuni.

Heðin D. Poulsen sigur, at hóast støk kunnu ættleiða, so verður krøvini ikki lækkaði.

- Tað eru nógv krøv, ið skulu lúkast, og støk skulu uppfylla tað sama sum hjún. Gera tey tað, so skilji eg ikki trupulleikan við tí, sigur Heðin D. Poulsen, formaður í Ættleiðingarfelagnum.

Sum dømi kann nevnast, at støk eitt nú skulu hava eina stóra kontaktflatu, eina nøktandi inntøku og umstøður, og atlit verða í ógvuliga lítlan mun tikin til hvørt tey eru støk ella ikki.

Ríkisumboðsmaðurin tekur støðu til, hvør er egnaður at ættleiða og ikki, og í skrivandi løtu er dømi um eina staka kvinnu í Føroyum, ið hevur ættleitt.

- Altjóða endamálið við ættleiðing er, at barnið skal hava tað gott. Sjálvsagt hevur barnið tað betri við einari mammu ella einum pápa, enn til dømis í einum barnaheimi, sigur Heðin D. Poulsen.

Tá ið avgerðin hjá ríkisumboðsmanninum er fallin, ber til at kæra avgerðina til eina danska kærunevnd.

### Eingin trupulleiki í praksis

Hóast Heðin D. Poulsen leggur dent á, at støk eins væl og hjún skulu hava møguleika at ættleiða, so heldur hann, at í roynd og veru kann eingin trupulleiki standa av hesum.

- Lóggávan í teimum londunum, ið føroyingar ættleiða frá er altavgerandi fyri, hvørt støk kunnu ættleiða ella ikki. Og í meginpartinum av ættleiðingarlondunum ber tað ikki til at ættleiða sum stakur. Tí er eingin trupulleiki í praksis, sigur Heðin D. Poulsen.

Sum lóggávan í nógvum av heimsins londum er, so ber tað í fáum førum til at ættleiða sum stakur, men nærum aldrin til at ættleiða sum skrásettur í parlag.

- Føroyingar mótsiga sær sjálvum, tí tað er nærum ógjørligt hjá fólki, sum liva í skrásettum parlag at ættleiða. Við at lova samkyndum at skráseta seg í parlag, so høvdu vit útilokað tann trupulleikan, meðan støk enn høvdu havt ein lítlan møguleika, sigur Heðin D. Poulsen.

Mest vanligt er, at hjún hava fyrsta rætt á ættleiðingarøkinum og harnæst støk.

### Taka frástøðu frá tingmonnum

Politiskar røddir hava verið frammi og sagt, at lóggávan skal broytast, soleiðis at støk og samkynd ikki skulu hava møguleikan at ættleiða.

Hesum tekur Heðin D. Poulsen frástøðu frá.

- Vit taka frástøðu frá teimum tingmonnum, ið vilja broyta lógina. Vit hava fult álit á ríkisumboðsmanninum og hansara avgerðum og meta tað verða skeivt grundarlag at broyta lógina uppá, sigur Heðin D. Poulsen formaður í Ættleiðingarfelagnum.

# Sambandstingmaður ímóti at støk kunnu ættleiða

**Børn skulu hava tvey foreldur, sigur Helgi Abrahamsen, sum eisini er ímóti, at samkynd skulu hava møguleika at ættleiða**

ÆTTLEIÐING

*Barbara Holm*
*barbara@sosialurin.fo*

Í orðaskiftinum um ættleiðing hevur serstakliga ein tingmaður víst sína ónøgd, og er tað Helgi Abrahamsen, tingmaður fyri Sambandsflokkin.

Í munligum fyrispurningi spurdi Helgi Abrahamsen, hvørjar mannagongdirnar eru í samband við ættleiðing. Orsøkin til fyrispurningin er, at tað kom óvæntað á tingmenn, tá ið málið um ættleiðing bleiv viðgjørt í rættarnevndini hjá Løgtinginum.

- Vit viðgjørdu eitt mál í rættarnevndini um ættleiðing, og har kom fram, at tað er gjørligt hjá støkum at ættleiða, og tað visti eingin tingmaður áðrenn, sigur Helgi Abrahamsen.

Tá ið tingmenn fingið frænir av lóggávuni, setti Helgi Abrahamsen ein fyrispurning í Løgtinginum.

- Eg haldi, at tað er týdningarmikið at endurskoða lógina, tí tað er eftir mínum tykki skeivt at loyva støkum at ættleiða, sigur Helgi Abrahamsen.

Spurdur um orsøkin til at hann heldur lóggávan skal forða støkum at ættleiða, sigur Helgi Abrahamsen soleiðis.

- Eg haldi, tað er synd fyri børnini, tí børn skulu hava tvey foreldur, sigur hann.

### Er eisini ímóti at samkynd ættleiða

Spurdur um, hvørt orsøkin til hansara hugsanir um ættleiðing er orsaka av, at samkynd við hesari lógini eisini fáa møguleikan at ættleiða, sigur Helgi Abrahamsen soleiðis.

- Eg eri ímóti, at samkynd kunnu ættleiða, hóast tað ikki er einasta grundgeving fyri hví eg vil broyta lógina, sigur hann.



*Helgi Abrahamsen, løgtingsmaður*